**Henrik Old**
**løgtingsmaður**

**nr. 13/2020**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur viðvíkjandi Bank Nordik, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvussu stórt vinningsbýti hevur landskassin fingið úr BankNordik samanlagt síðan 2010?

2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at selja almenna ognarlutin í BankNordik, og um so er nær?

**Viðmerkingar**
Samgongan hevur gjørt greitt, at tað liggur frammarlaga í ætlanunum at einskilja almenn partafeløg. Í hesum sambandi hevur talan m.a. verið um at selja almenna ognarlutin í BankNordik. Um støða skal takast til, um hetta er skilagott, er neyðugt við upplýsingum um, hvussu stórt vinningsbýtið úr felagnum hevur verið seinastu árini. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

**Á Løgtingi, 8. september 2020**

**Henrik Old**